# Miðvágs-Sandavágs skúli 50 ár

**Góðu næmingar og lærarar:**

Eg eri glaður at kunna bjóða tykkum øllum, smáum sum stórum, til hetta lítla hátíðarhaldið í ítróttarhøllini her á Giljanesi  nú skúlin á Giljanesi, Miðvágs-Sandavágs skúli, rundar tey fimti árini.

Tá eg var lítil smádrongur í Sandavági  var mangt øðrvísi enn tað er í dag. Vit høvdu ongar skrivibøkur ella roknibøkur, men brúktu talvu og griffil.  Tá fór man í skúla, tá man fylti 7 ár, tað vil siga, at eg, sum fylti 7 ár 21. desember í 1951,  fór í skúla 6. januar í 1952, og vit fóru úr skúlanum, tá vit fyltu 14 ár ella hjá mær 21. desember í 1958. Tað er ein tann besti dagurin, sum eg minnist afturá. Hálvt ár seinni fór eg longu aftur í skúla. Tað var so fyrstu ferð, at vágafólk fingu møguleikan, at ganga longur í skúla enn tey vanligu 7 árini, og byrjanin til at farið varð undir at byggja hendan skúlan.

Vit eru 6, sum eru knýtt at skúlanum enn, sum fluttu í henda nýggja skúlan fyri fimti árum síðani. Tað eru báðir umsjónarmennirnir:

Hálvdan Gudmundsen fór í 1.b, meðan Dagfinn Petersen fór í 6.a.

Lærararnir: Marianna Simonsen fór í 5.flokk, Árni Frederiksen fór í 6.b og Hans Jørgensen fór í 1.preliminerflokk.

Eg sjálvur, Árni Jacobsen, fór í 2. preliminerflokk ella tað, sum í dag hevði svarað til 9. flokk.

Eg veit, at fleiri halda, at skúlin ella bygningurin er einki at rópa hurra fyri. Bygningurin hevur sæð betri dagar, hann var flottur fyri fimmti árum síðani, men í mínum hugaheimi er tað ikki so nógv sjálvan bygningin, sum vit hátíðarhalda.

Heldur er tað, at vágafólk fingu møguleika fyri at ogna sær størri kunnleika javnbjóðis við onnur runt landið og harvið fingu møguleikar at fáa sær eina útbúgving. Tað er meira neyðugt í dag enn tað nakrantíð hevur verið, at øll fáa eina útbúgving.

Eg havi tvinnar heilsanir til tykkara. Tann fyrra er frá skúlastjóranum, Hans Jørgensen. Hann hevur tað gott, og tað gongur framá hjá honum.

Hin heilsanin er frá 6.b, sum gongur í skúla í Kommunuhúsinum í Sandavági. Heilsanin ljóðar soleiðis:

Góði skúli. Hjartaliga til lukku við 50 ára degnum. Takk fyri 6 góð ár. Vit gleða okkum at feira hendan dagin saman við tær.

Vinarliga 6.b.

**Tey, ið ganga í 6. b, eru:**

Rannvá Briansdóttir, Janita Ole-Jacobsen, Bettieyð Ellingsgaard, Magni Weihe, Rói Birgirsson Ehlers, Vinjar Egilsnes Petersen, Janus Svabo Samuelsen, Egor Antonov, Annika Sveinsdóttir Thomassen, Eva Kristiansen, Silas Eyðsteinsson, Ellie Balid Cruz ( Eli ), Niels Mouritsen, Tummas Hansen,Miriam Vang Haraldsen, Hørður Egilsson og Barbara Johnsdóttir Prior.

Nú er nokk snakkað, tí nú kunnu tit gleða tykkum til at fáa okkurt gott undir tonnuna.

Tit vera sitandi við borðini, meðan lærararnir fara at ganga runt og bjóða tykkum sunkist, twix og súrepli.

Her koma tríggjar gentur úr 7.a, sum bjóða seg fram til at syngja fyri okkum. Tær eru Erla Lið, Kristina Mouritsen og Anna Kristina Thomassen. Vit klappa fyri teimum og so koma tær bara upp higar. Lærarin Finnur Joen-Jacobsen kemur at spæla undir hjá teimum.

Tær fara at syngja: Túsund og eina nátt, Eitt sunnukvøld í plantasjuni og Tú skalt klappa, tá tú ert í góðum lag.

Síðan koma eisini 1.a og 1.b upp at syngja. Eyðgerð Nattestad, stuðul, skipar fyri hjá teimum.

**Tey, ið ganga í 1.a eru**: Malan Andorsdóttir, Julian Anthoniussen, Olivia Sunadóttir Hansen, Sofía Vang Haraldsen, Klara Johannesen, Ólavur Johannesen, Krista Johansen, Regin Dahl Lauritsen, Elin Sólvør á Løgmansbø, Ian Leivur á Løgmansbø, Stefan Niclasen, Marjun Egilstoft Nielsen, Martin Weihe Nielsen, Suni í Horni Nielsen, Hanna Ole-Jacobsen, Høgni Reinert á Plógv, Hans Elmar Poulsen, Rebekka Bjarnadóttir Prior, Albert Hansson Ravnsfjall og Edit Vidtfeldt.

**Tey, ið ganga í 1.b eru**: Bjørg Bláberg, Bjørt Gaardlykke Davidsen, Eiler Fróðason, Markus í Giljum, Sólveig Asmita Hansen, Bartal Heðinsson, Ísakur Rikhardsson Johansen, Gunnar Kárason í Løðu, Yngvi Madsen, Mikala Martinsdóttir, Rógvi Karbech Mouritsen, Hans Eli Myllá, Jóanis Rasmussen Nattestad, Asta Egilstoft Nielsen, Mary á Presttrøðni, Maria Elisabet Halsdóttir Selfoss, Hákun Jóhansson Stenberg, Hanna Thomassen og Miriam Thomassen.

At enda kemur eisini 4.flokkur upp at syngja. Finnur Joen-Jacobsen spælir undir hjá teimum.

**Tey, ið ganga í 4.flokki eru**: Torkil Anderson, Torgunn Davidsen, Lý Dánialsdóttir, Dann Fróðason, Frank Gaardlykke, Árni Sarvendra Hansen, Jóhann Erlingur Weihe Hansen, Petra Sunadóttir Hansen, Thór Hartmann Hansen, Jógvan Sigurd Eldevig Hattarstein, Heidi Sandberg Joensen, Jona Joensen, Ísakur Gaardlykke Næs, Rakul á Lofti, Hans Magnusson, Borgar Oddmarsson, Rakul Højgaard Poulsen, Sesilia Johnsdóttir Prior, Leivur Debes, Jonnhild Thomassen og Jonn Rói Tórfinnsson.

Tá liðugt var, vóru øll samd um, at hetta hevði verið ein væleyðnaður fimti ára føðingardagur, og næmingarnir fóru glaðir heim, meðan lærararnir fóru at fáa sær smurt breyð.

Árni Jacobsen